# Stuttligt at kunna hjálpa øðrum

**Skótahjálpin í ár var ætlað sum stuðul til tvær verkætlanir heima og úti. Í eina viku gingu skótar hús úr húsi fyri at gera fyrifallandi arbeiði. Millum hesar var 11 ára gamla Annika Hansen úr Havn. - Eg haldi ikki, at tað var strævið at vera við, sigur hon**

SKÓTAHJÁLP
*Orð/myndir: Snorri Brend*


*Tað er ikki bert Annika Hansen sum er virkin skóti. Tríggjar av systrum hennara eru somuleiðis virknar ella hava verið virknar í KFUK-skótunum: Aftast vm.: Marjun og Solveig, og fremst vm.: Rakul og Annika*

**Havn:** - Tað var sera stuttligt at vera við í skótahjálpini. Og eg upplivdi eisini nógv sera spennandi ting hesa vikuna.

- Eg slapp m.a. at dustsúgva hjá onkrum, og í einum øðrum staði vaskaði eg bilin, og nógv annað. Jú, hetta var ein sera skeg vika, tí fólk vóru so blíð at koma inn til, sigur Annika Hansen, sum er KFUK-skóti í Havn.

Saman við hundraðtals øðrum skótum í Føroyum var hon við í teirri sonevndu Skótahjálpini í ár. Her gingu skótarnir hús úr húsi fyri at bjóða seg fram til alt fyrifallandi arbeiði hjá fólki.

Allur tann innsavnaði peningurin fór hesaferð til tvey vælgerandi endamál. Og á eini samkomu herfyri vórðu 100.000 kr. lætnar tveimum slíkum endamálum - einum úti í heimi og einum í Føroyum, umframt ein part, sum fór í ein bráðfeingisgrunn.

Eg haldi ikki, at tað var so strævið at vera við í skótahjálpini. Eg visti, at tað fór til okkurt gott endamál, og tí hugnaðu vit okkum hesa vikuna, sigur Annika Hansen við Sosialin.

Hon og systrar hennara vóru sjálvandi við, tá úrslitið av Skótahjálpini varð kunngjørt og tá peningurin latin.

### Leikur og vanlukka

Skótahálpin hevur nú rættiliga mong ár á baki, og er líkasum nakað, sum skótarnir síggja fram til á hvørjum ári.

Her eru tað skótarnir sum taka upp fyrifallandi arbeiði heima hjá fólki, og sum síðani fáa eina samsýning goldna fyri tað. Peningurin verður so savnaður saman og latin til ávís góðgerandi endamál.

Í ár varð avgerð tikin um, at tann føroyski parturin skuldi vera ein stuðul at keypa leikur til nýggju Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum.

Tann útlendska verkætlanin var at stuðla einum heimi fyri fátækar gentur av santalfólkinum í Bangladesh, - eitt arbeiði sum føroyski trúboðarin, Óluva Laksá hevur verið knýtt at í mong ár. Tað er somuleiðis hon, sum tryggjar at peningurin verður nýttur á skilagóðan hátt.

Samlaða úrslitið av skótahjálpini í ár var góðar 148.000 kr., og fingu hesar báðar verkætlanirnar hvør sínar 50.000 kr.

Hinvegin so fekk Reyði Krossur Føroya 30.000 kr. úr bráðfeingisgrunninum at nýta í samband við herviliga jarðskjálvtan í Pakistan. Nevnast kann, at Reyði Krossur fekk eisini 100.000 kr. í januar mánaði at hjálpa til eftir flóðalduvanlukkuna í Indiska Havninum.

## Skótahjálpin

- Fer vanliga fram í viku 39
- Allar tær fýra skótasamskiparnirnar eru við.
- Skótar úr øllum landinum gera fyrifallandi arbeiði heima hjá fólki - t.d. ganga ørindi, vaska bil, taka upp epli, dustsúgva, ansa børnum og mangt annað.
- Allur peningurin fer til góðgerandi endamál heima og úti
- Skótahjálpin 2005 gav 148.000 kr.



*Fróði Joensen, yvirlækni tekur móti gávuni frá Skótahjálpini fyri Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum*

## Nú er vegurin liðugur

**Kalsoy:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við nýgerð av vegnum frá Knúksdali til Syðradals.

Í dag er støðan tann, at vegurin er liðugur og haraftrat asfalteraður. Nakað er enn eftir at gera, í sambandi við veitirnar, skráarnar og vegastokkin.

Kostnaðarætlanin fyri arbeiðið er 1,5 mió. kr.

Hetta arbeiðið hevur verið rættiliga neyðugt at fáa liðugt, nú nýggja ferjulegan í Syðradali er tikin í nýtslu og ferðasambandið til oynna er bøtt munandi.

**sb.**


*Nógv ferðsla er í Kalsoynni nú ferjulegan á Syðradali er tikin í nýtslu*

## Lívdin fær størri høli

**Samkoma:** Í farnu viku skrivaðu samkoman Lívdin og fyritøkan Balslev undir eina leiguavtalu um bygningin á Brekku 3 í Hoyvík.

Í nýggju hølunum, sum eru um 250 fermetrar til støddar, ætlar samkoman at hava ein part av víttfevnda virksemi sínum mitt í viku, m.a. tiltøk fyri tey ungu og tónleikavenjingar.

Hetta eru í roynd og veru somu hølir sum fríkirkjan Oasan helt til í, inntil tey flutt í nýggja bygning teirra fyri stuttum.

Hóast samkoman nú hevur leigað seg inn í henda bygningin, so verða møtini sunnudag framvegis hildin í Hoyvíkar skúla.

**sb.**

## Reint vatn til bygdarfólkið


*Sørvingar fáa reint vatn, nú kommunan hevur keypt nýggja vatnreinsiskipan*

**Sørvágur:** Á bygdaráðsfundi í farnu viku varð samtykt at taka av einum tilboði frá NOMATEK úr Havn um nýtt reinsiverk.

Henda fyritøkan hevur í fleiri ár verið á marknaðinum, og hevur framleitt umleið 27 størri og smærri reinsiverk til bygdir og býir í Føroyum.

Skipanin verður væntandi latin kommunu um einar 10 vikur, og kunnu borgarar í Sørvági tí vænta at reint vatn rennur úr vatnkranunum tíðliga í komandi ári.

Húsið til reinsiverkið varð bygt samstundis sum brunnarnir vóru bygdir fyri nakað av tíð síðani.

Nevnast kann, at Sørvágs Kommuna umframt hesa skipanina sum nú er bíløgd, hevur tríggjar aðrar smærri skipanir frá sama felagi.

**sb.**